# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Kringvarpið hevur tríggjar dagar




*Hóast samráðingar hava verið millum Kringvarpið og ÍSF í nærum tvey ár, so tykist knúturin enn vera tann sami. Kringvarpið sigur, at tey kunnu ikki binda seg skrivliga til at nýta ávís sponsor-nøvn á ávísan hátt*

**Eftir at hava samráðst um nýggjan sáttmála í nærum eitt ár, er bikarið hjá ÍSF flotið yvir. Um vikuskiftið sendu teir skriv til Kringvarpið, sum kann missa rættin at senda beinleiðis frá føroyskum ítróttatiltøkum**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Vit skulu hervið boða tykkum frá, at tit, grundað á at samráðingarnar ikki føra til nakað úrslit og mugu metast sum slitnaðar, og tað tí heldur eingin sáttmáli er partanna millum, ikki hava rætt at senda frá føroyskum ítrótti, frá 15. desember 2007 at rokna.

Soleiðis endar brævið, sum ÍSF tann 7. desember sendi Kringvarpsstjóranum. Eitt bræv, har tað verður staðfest, at samráðingarnar um nýggjan sáttmála um rættindi at senda ítrótt eru slitnaðar.

Partarnir hava ikki havt nakran sáttmála seinasta lítla árið, tí á nýggjárinum rann táverandi sáttmálin út. Men so leingi samráðingar hava verið, hava partarnir virkað eftir gamla sáttmálanum.

Men eisini tað er nú liðugt. Eftir øllum at døma er bikarið flotið yvir, tá Kringvarpsstjórin ikki vildi góðtaka seinasta sáttmálauppskotið, sum ÍSF sendi. Í brævinum um uppsøgn vísir ÍSF á, at Jógvan Jespersen ístaðin broytti uppskotið, sum hann síðani skrivaði undir og sendi ÍSF.

### Ikki uppsøgn

Sjálvur vil ÍSF-forsetin, Heðin Mortensen, tó ikki kalla brævið fyri eina uppsøgn.

- Tað meta vit ikki, tí vit hava altso givið eina freist til 15. desember, og tað eru so nakrir dagar afturat.

Vil tað so siga, at talan er um eina seinastu hóttan?

- Eg vil heldur siga, at hetta er ein staðfesting av, at vit koma ikki víðari í verandi støðu. Og tolið hjá okkum er uppi nú. Vit halda okkum hava verið sera lagalig í samráðingunum, men upplivingin hevur fyri tað mesta verið einvegis samskifti, og tað vilja vit ikki longur góðtaka, sigur Heðin Mortensen.

## Ein regla á muni

**Kringvarpsstjórin sigur, at tað bert er ein regla, sum skilir Kringvarpið og ÍSF. – Verður tann reglan strikað, skriva vit undir, sigur hann**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Jógvan Jespersen dugir illa at skilja, at ÍSF í sínum skrivi til Kringvarpið vísir á, at hann skal hava sent eitt nógv broytt sáttmálauppskot aftur til ÍSF.

- Tann broytingin, sum eg rokni við, at tey sipa til, snýr seg um eina lítla detalju í sáttmálanum. Í grein 4 í sáttmálanum kom í fjør at standa, at Kringvarpið viðurkennir, at ávísar kappingar bera nøvn hjá sponsorum. Og at vit nýta hesi heiti, tá tað er náttúrligt og hóskiligt.

- Tað, sum tey síðani vilja hava afturat er ein regla, har tað verður staðfest, at Kringvarpið bindir seg til at nýta hesi heiti á stiga- og úrslitatalvum, og tað er ein treyt, sum vit ikki kunnu góðtaka. Allar aðrar broytingar, sum eru gjørdar, hava vit gjørt í samráð við Petur Elias Petersen, sum er varaforseti í ÍSF.

*Hví kunnu tit ikki góðtaka seinastu treytina?*

- Vit hava eina kringvarpslóg, sum vit skulu virka undir. Millum annað verður í hesari staðfest, at tað skal vera púrasat greiður skilnaður millum redaktionelt innihald og lýsingar. Og tí meta vit, at stríðir ímóti lógini, um vit skrivliga binda okkum til at nýta sponsor-nøvn.

- Sjálvandi vita vit, at ítróttarrúmið er á tremur við lýsingum. Og hesir lýsarar fáa jú eina velduga eksponering í 3-2 sjónvarpssendingum. Trupulleikin hjá okkum er, at vit kunnu ikki binda okkum til at eksponera hesi á ávísan hátt.

### Hildu seg hava semju

Jógvan Jespersen sigur annars, at hann var eitt sindur skakkur, nú hann fekk seinasta brævið frá ÍSF.

- Fyri mítt viðkomandi má eg siga, at helt, at ein semja varð funnin longu í apríl mánaði. Tá høvdu vit havt ein fund, har eg helt, at alt var komið í rættlag. Men síðani eru tey komin við fleiri treytum afturat.

- Sum sagt, so helt eg tó, at hetta var loyst í september mánaði, men nú er støðan so ein onnur.

Heðin Mortensen sigur, at enn eru nakrir dagar til 15. desember, og at bólturin nú liggur hjá tykkum. Fara tit at taka nýggj stig til at finna eina semju?

- Vit fara so at hava fund um málið her í Kringvarpinum, og so rokni eg við, at vit seta okkum í samband við ÍSF í hesi vikuni.

## 07 Vestur er navnið

Umleið 30 uppskot komu inn, tá FS Vágar skuldi hava nýtt navn. Sjálvt navnið, FS Vágar, fór í søguna, tá samstarvið millum MB og SÍF slitnaði. Í fjør varð navnið FSV04 nýtt, men formliga var tað tá bert SÍF, sum stóð fyri felagnum. Nú er SÍ knýtt afturat samstarvinum, og fyri at geva felagnum nýggjan samleika, varð navnakapping skrivað út. Hendan endaði so við, at 07 Vestur verður nýggja navnið hjá felagnum. Á heimasíðuni, sum tó enn ber navnið www.fsvagar.fo, verður sagt, at ætlanin nú er at skriva út búmerkjakapping, soleiðis at talan eisini verður um nýggjan grafiskan samleika.

## Fekk 20 daga fongsul

Maðurin, sum tann 2. juni leyp inn á vøllin eftir dómaranum, tá Danmark og Svøríki spældu fótbóltslandsdyst, fekk herda revsing, tá málið hjá honum í gjár var fyri í eystara landsrætti. Undan hesum hevði maðurin fingið 30 daga treytað fongsul. Tann dómin var ákærin ikki nøgdur um, og tí varð dómurin kærdur til eystara landsrætt, sum broytti dómin til 20 daga treytaleysa fongsulsrevsing.

## Høgni aftur til ÍF

ÍF, sum nú ger enn eina roynd í Formula-deildini, hevur fingið Høgna Madsen aftur í spælarahópin. Høgni hevur í trý ár spælt við KÍ, men í fjør kom hann veruliga í brennidepilin, tá hann endaði í sentrum í venjaraskiftinum, har Tony Paris fekk sekkin. Við Dimmalætting sigur Høgni tó, at hendan hendingin einki hevur við skiftið at gera.